Skúlastýrisfundur 11. september 2025

Møtt: Anna Maria Reinert Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Margith Lamhauge, Trygvi í Liða, Mads Hoydal, Theodor E. D. Olsen, Elin Maria Ó. Olsen.

Skráin verður umløgd av tí at eitt næmingaráðsumboð kom inn at siga frá námsferð.

Námsferð:

Miriam Eysturtún, næmingaráðsumboð í 9.a leggur fram ynski frá næmingaráðnum um at fáa loyvi frá skúlastýrinum, til at fara á námsferð.

- námsferðir eru læruríkar
- góðar fyri trivnaðin
- læra fíggjarliga ábyrgd og at savna pening
- allir næmingar, ið eru spurdir ynskja námsferð
- eru sinnað at gera atferðarreglur viðvíkjandi námsferð

Fyrispurningur um námsferð er eisini komin frá einum foreldri í 8. Flokki.

Kjak um námsferð:

- næmingarnir ynskja tað
- evt. kann man gera námsferðir í Norðurlondum, og tann vegin byggja á norðurlendska samleikan
- alment dannilsi er eisini at víðka sjónaringin út um Føroyar
- tey, sum hava ringast ráð at fara á námsferð, hava kanska ongantíð ráð at ferðast við foreldrunum

Karmar:

- tað eigur at vera null-toleransa yvir fyri rúsdrekkanýtslu á námsferð
- námsferð eigur at vera treytað av at lærarar vilja við næmingunum
- lærararnir kunnu finna skipaðar ferðir/støð
- tað skal vera ein kobling millum lærdóm, dannilsi, skúla og námsferð.

Avgerð:

Foreldrini hava eitt principielt loyvi at skipa fyri eini námsferð í 9. flokki til eitt skipað stað í samráð við skúlan.

Trivnaðarætlan:

Trivnaðarætlanin verður løgd fram, umframt tillagaði systematik-myndilin.

- Andsøgn í at hava trivnaðarætlanina og systematikmyndilin, vit mugu ansa eftir at hava trivnaðin í fokus, og ikki mistrivnaðin.
- Tó verður gjørt vart við týdningin av at hava eitt amboð, um tað gongur galið.

Systematikmyndilin verður brúktur av leiðslu og AKT og SSP. Lærarar fáa atgongd til mannagongdirnar, hóast systematikkmyndilin einans er ætlaður serliga torførum støðum. Anna Maria ger vart við at tað bert eru slíkar støður, sum koma til leiðsluna.

Tað verður spurt inn til næmingasamrøðurnar.

Tað átti at verið gjørt meira burturúr at næmingarnir vita hvat næmingasamrøðurnar eru fyri nakað. Tað hevði verið mest virðiligt.

Borgarstjóravitjanin er útsett til 6. oktobur

Alt býráðið er boðið. Væntandi koma Elsa Berg og trivnaðarnevndin.

- Ynski er um, at býráðið sær, hvussu vit húsast, at arbeiðsumstøðurnar eru versnaðar
- Skúlastýrið og leiðslan ynskja hvør sítt umboð í bygginevndina, tá nýggjur skúli skal byggjast.
- Skipan av bygginevnd í Hoyvíkar skúla er á skrá hjá kommununi

Frihedsbrevet

Skúlastjórin greiðir frá støðuni sum elvdi til greinina í Frihedsbrevet. Hetta er uppfylging av greinini sum kom út fyri summarfrítíðina.

- Vit arbeiða við at senda góðar søgur út.
- Sakin er send lærarafelagnum til ummælis

Spurt verður inn til stuðulsskipan i 9. fl.

- Har eru tvílæraratímar, sum skulu lyfta fakliga støðið

Kjak:

Børn sum eru harðlig í skúlanum, eiga at verða eygleidd og hjálpt.

Skúlin eigur eisini at ansa eftir teimum, sum verða happað ella fyri harðskapi.

6. fl í Hoyvíkarskúla vann fiskikapping við Westward Ho

- send góðu søgurna út á Vágaportalin, ikki bert á heimasíðu skúlans

Máltíð fyri skúlastýrinum

Vanliga verður skúlastýrið boðið til eina máltíð. Stjórin setur dagfesting og sendir stýrinum

Felags foreldrafundur

Nær skulu vit hava felags foreldrafund fyri skúlan?

Skúlin sendir eina dagfesting. *(Uppskot 14. Januar)*

Skúlastýrið vil fegið leggja fram hvørji ynski tey hava á felags foreldrafundinum; hvat tað vil arbeiða fyri.

Skúlastýrið ynskir at hitta foreldraumboðini, tá hesi eru vald.

Næmingaráðið:

Skúlastýrið ynskir at fáa næmingaráðið inn at greiða frá arbeiðinum hjá sær.

Annað:

Avriksskjal: Skúlastýrið ynskir eitt skjal til at vísa avrik. Á talvuni uttanfyri skrivstovuna, eigur skúlastýrið eitt pláss til sama endamál.

Morgunsangur: Fyrispurningur kemur um hvussu tað gongur at syngja morgunsang oftari. Víst verður á ónøgd við, at hóast avgerð varð tikin á seinasta skúlastýrisfundi, um at hava morgunsang oftari, er hetta ikki hent.

- Hetta vísti seg ikki at vera eins lætt, og vónað, men arbeitt verður við tí. Um ikki so ofta sum ætlað, syngja vit serligar dagar eisini nú.
- Skúlastjórin ger vart við at so átti at verið kunnað um hetta. Tí varð avgerð tikin um framyvir at byrja hvønn skúlastýrisfund við at lesa seinastu fundarfrásøgnina, soleiðis at eventuel mál kunnu takast uppaftur.

Telefonreglur: Ynski er um at seta nýggjar telefonreglur í verk, soleiðis at næmingar ikki hava telefon við í skúla. Arbeitt verður við hesum, m.a. við tiltakinum hjá Betri, *Nærveruvika*.

Ferðslupatrúlja: Skúlastýrislimur greiðir frá ferðslupatrúlju, sum er uttanlands og vísir á ótta, tá næmingar ferðast tvørtur um Vegin langa. SSP játtar at kanna umstøðurnar fyri hesum, og royndarkoyra tað.

Staðseting av A og B flokkum: Fyrispurningur verður settur um hví A og B flokkarnir í hádeild eru hvør sínum megin gongina. Hetta er vegna floksstødd og hjá onkrum flokki fyri at minka um samanbrestir.